## Línuspæl stolið úr báti

Tjóvar hava verið umborð á einum lítlum útróðrarbáti, sum lá við bryggju í Havn. Báturin nevnist m/b Karina, hann er í konkurs, og Føroya Banki hevur ábyrgd av honum. Eitt línuspæl fyri 225.000 krónur er stolið. Tjóvaríið var meldað fríggjadagin.

*randi@sosialurin.fo*





# ALS sæst aftur í kommunukassunum

**SKATTUR Økt arbeiðsloysi kann vera ein orsøk til, at kommunur í ár hava fingið meira inn í skatti, tí útgjaldið er so nógv økt**

**Randi Jacobsen**

Fleiri orsøkir kunnu vera til, at flestu kommunurnar higartil í ár hava fingið meira inn í skatti enn sama tíðarskeið í fjør, og framgongdin í skattinntøkum kann neyvan tulkast sum, at kreppan er við at hasa av. Talið av arbeiðsleysum er ikki minkað, heldur øvugt. 1500 fulltíðararbeiðsleys eru skrásett hjá ALS, sum hevur meira enn 400 umsóknir eftir at viðgera. Tað vil siga, at arbeiðsloysið táttar í tey 2000 fólkini. Summar umsóknir liggja og bíða vegna vantandi upplýsingar.

Við at spyrja runt hjá kommunum um, hví tær hava fingið væl meira inn í skatti, fáast ymisk svør.

Summar kommunur nevna, at fleiri hýrur er útgoldnar í tíðarskeiðinum, onkrastaðni er skattaprosentið hækkað, fiskiskapurin hevur verið góður, og í smáum kommunum merktist óvanliga nógva kavaruddingin væl.

Ernast Jacobsen, stjóri í Arbeiðsloysiskipanini nevnir eina orsøk aftrat, og tað er økta arbeiðsloysið.

Tað kann ljóða eitt sindur margháttligt, at økt arbeiðsloysi kann gevur fleiri krónur í kommunukassarnar.

### Fáa meira

Men í fjør hækkaði hægsta útgjaldið frá ALS úr 12.000 krónum upp í 20.000 krónur.

– Vit síggja eisini, at í onkrum bygdum við fiskaarbeiði hava fleiri fólk ikki arbeitt fulla tíð. Tá ið tey vórðu søgd úr starvi, fingu tey fult útgjald frá ALS. Tað má síggjast aftur, sigur Ernst Jacobsen.

Hann heldur tað vera ilt at siga, hvussu verður við arbeiðsloysinum komandi mánaðirnar. ALS hevur fingið onkar ábendingar um fyritøkur, sum fara at siga fólk upp, men samstundis stingur okkurt nýtt seg upp.

Eisini væntar Ernst Jacobsen, at meira arbeiði fer at verða í byggivinnuni, nú summarið nærkast. Um ikki nakað stór bygging fer í gongd, er hugsandi, at meira umvælingararbeiði verður. Nú lættari er at fáa handverkarar, er væl hugsandi, at fleiri fólk fara undir at gera til trongdar umvælingar av húsum sínum.

*randi@sosialurin.fo*

# Okkara øl á trappuni

**NÝTT ØL Um nakrar fáar vikur verður ølið av nýggja bryggjarínum á Velbastað at fáa, sigur Wilhelm Petersen, stjóri í Okkara**

**Randi Jacobsen**

Í fleiri ár hevur smápartafelagið Okkara arbeitt við at fáa eitt nýtt bryggjarí á føtur, og umsíðir er glið komið á.

Í desember varð vald nýggj nevnd, og Wilhelm Petersen varð settur til stjóra í fyritøkuni.

Og nú er ferð komin á.

Fíggingin er fingin til vega, og alt tað formliga er í lagi.

– Vit eru við at gera klárt til at fara undir at bryggja, sigur Wilhelm Petersen.

Hann sigur, at heilt skjótt verður nýggja ølslagið at fáa, men um tað verður til hvítusunnu, torir hann ikki at siga.

### Ølið Okkara

Navnið á nýggja ølinum verður Okkara, sum er navnið á gamla felagnum hjá Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefrabrik.




*Wilhelm Petersen er stjóri á nýggja bryggjarínum*

Nýggja bryggjaríið fer at bryggja tey vanligu ølsløgini sum pilsnara, classic og gull, men ætlanin er at hava nøkur serlig sløg av øli. Byrjað verður við einum slíkum ølslagi.

Wilhelm Petersen sigur, at bryggjhúsið fer at tappa øl bæði í fløskur og í dósir, tí eftirspurningurin eftir dósaøli er vaksandi. Tey serligu sløgini av øli verða tó bara í fløsku.

Komið er so langt áleiðis, at allir tangarnir eru komnir upp, og handverkarar arbeiða við at seta tappiskipanina saman. Frammanundan varð alt tikið innan úr húsinum, sum er nýinnrættað.

Húsið hjá Okkara er tað gamla eggvirkið.

Okkara hevur fingið ein kendan danskan bryggjmeistara, Peter Clementen, at standa fyri framleiðsluni.

### Góðar vónir

Wilhelm Peteren hevur góðar vónir um, at tað fer at ganga nýggja bryggjaríinum væl, millum annað tí at tað liggur so stutt frá Havnini, har so nógv fólk búgva, og tær flestu matstovurnar eru.

Hann væntar, at starvsfólkini á Okkara verða fimm ella seks, og so koma øll tey aftrat, sum skulu koyra út, og goymslur verða eisini.

Annars ætlar Okkara sær at luttaka við nýggja ølinum á ein stórum ølfestivali, sum verður í mai í Valby í Danmark.

*randi@sosialurin.fo*